# SKEIÐ
VETRARHÁLVAN 2000
- í ekslusivum umhvørvi við bestu útgerðini ...

Microsoft TELDU-KOYRIKORT

PARTUR 1: ALMENT UM KT 12 undirvísingartímar
PARTUR 2: TELDAN OG STÝRISKIPANIR 12 undirvísingartímar
PARTUR 3: TEKSTVIÐGERÐ Word grundskeið 16 undirvísingartímar
PARTUR 4: ROKNIARK Excel grundskeið 16 undirvísingartímar
PARTUR 5: - DÁTUGRUNNUR Access grundskeið 16 undirvísingartímar
PARTUR 6: - FRAMLØGA PowerPoint grundskeið 8 undirvísingartímar
PARTUR 7: - KUNNING OG SAMSKIFTI (WWW) Internet grundskeið 12 undirvísingartímar

Fyrstu skeiðini byrja 22. aug
Sí annars heimasíðu okkara



Hevur tú bert brúk fyri einum ella nøkrum av skeiðunum, er sjálvandi møguleiki fyri hesum!

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

- altíð eitt skeið til tín tørv!

SKOTARÓK 14 100 TÓRSHAVN TLF. 211861 og 311414 FAX 317534
http://kvasir.farodane.fo kvasir@farodane.fo



# SKEIÐ
VETRARHÁLVAN 2000
- í ekslusivum umhvørvi við bestu útgerðini ...



NÝTT SKEIÐ

Fyrsta skeiðið byrjar 15. august.
Sí annars kalendaran á heimasíðu okkara:
http://kvasir.farodane.fo

## Teldan og eg
Absolutt byrjaraskeið



- fyri teg, ið neyvan torir at tendra og sløkkja telduna!

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

- altíð eitt skeið til tín tørv!

SKOTARÓK 14 100 TÓRSHAVN TLF. 211861 og 311414 FAX 317534
http://kvasir.farodane.fo kvasir@farodane.fo


## Sethús í Havn til sølu



Um hóskandi boð fæst selja vit sethúsini á Heygsmannavegi 9. Húsini eru í 2 hæddum og bygd í 1967. Áhugað kunnu venda sær til

**Advokatskrivstovuna Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

## SUMMARFRÍ

Skrivstovan er stongd frá 24. juli til 21. august 2000

**FØROYA JARÐARRÁÐ**

fax 311185 · teldupostur: fj@fj.fo

## Lærarar

Søkt verður eftir 2 lærarum til Hvalbiar Skúla skúlaárið 2000/2001. Eitt fulltíðarstarv og eitt 25 tímar.

Størvini eru tíðaravmarkað. Lønt verður samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Umsóknir til størvini skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 7/7-00.

**Hvalbiar Skúlanevnd**
v/ Conny Poulsen
FO-850 Hvalba

## Motorsúkkla við skaða til sølu

**Merki:** Suzuki GSX-R400R
**Árg.:** 1989
**KM:** 13999

Motorsúkklan verður seld sum hon stendur nú og kann síggjast eftir avtalu við sýnsmann okkara á Smyrilsvegi, 100 Tórshavn.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Beinleiðis tlf. 345727 - fartelefon 283892
fax nr. 345607

Fróði Müller
at hitta millum kl. 13.00–15.00

## Húsarhaldsskúli Føroya
### søkir
## lærara (avloysara)

Søkt verður eftir einum Føðslu- og húshaldsfrøðingi (Ernærings- og husholdningsøkonom) at undirvísa fulla tíð í tíðarskeiðnum 07.08.00–31.02.01.

***Starvið umfatar*** undirvísing í matgerð, kostlæru, føðslulæru, vørukunnleika, reinføri o.ø. og annars at vera við til at fyriskipa ymisk tiltøk á skúlanum.

***Vit kundu hugsað okkum*** eitt starvsfólk í hevur áhuga at arbeiða saman við ungdómi, og sum annars hevur hug at seta sín dám á skúlan.

***Meir fæst at vita*** um starvið við at venda sær til leiðaran á skúlanum Jóhonnu á Tjaldrafløtti.

***Umsókn*** við neyðugum prógvum og CV skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 10. juli 00.

**Húsarhaldsskúli Føroya**
Stoksoyrarvegur 29 · 700 Klaksvík
tlf: 456974, 216974 fax 457664
teldupostur: hsf@post.olivant.fo

## Lærupláss

Vit hava brúk fyri einum lærlingi til rørsmíð at byrja beinanvegin.

Ert tú nærlagdur og hevur koyrikort, skuldi tú komið inn á gólvið og tosa við okkum sum skjótast.

Hógv framleiðir ketlar, arbeiðir við at selja og seta upp hitaverk, ventilatión, sanitet, umframt mangt annað.

**Hógv Handilsvirki**
660 Søldarfjørður · Tlf. 441963

## Svimjihylurin

**Í tíðarskeiðnum 01.07. – 05.08.2000 er Svimjihylurin opin soleiðis:**

| | |
|---|---|
| Mánadag | kl. 19.00–21.00 |
| Onsdag | kl. 19.00–21.00 |
| Leygardag | kl. 15.00–18.00 |

**Vágs Býráð**

## SUMMARFRÍ

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at býráðsskrivstovan vegna summarfrí verður stongd fyri allari avgreiðslu frá mánadegi 10. juli til og við fríggjadegi 28. juli 2000.

*Fuglafjørður tann 28. juni 2000*
**Fuglafjarðar býráð**



## Sálarfrøðingur

søkist til Føroya Barnaheim 20 tímar um vikuna, at byrja 1. september 2000 ella eftir nærri avtalu.

Føroya Barnaheim er ein samdøgursstovnur fyri børn og ung í aldrinum 0–18 (20) ár, ið kunnu búgva her í styttri ella longri tíð. Tað er barnaverndin í heimkommununi hjá barninum/tí unga, ið inn- og útskrivar børnini/tey ungu. Á Barnaheiminum er pláss fyri 15 børnum og ungum, umframt 5 bráðfeingis pláss, á tveimum deildum; eisini kunnu familjur koma til eygleiðing og síðani til vegleiðing.

Uppgávurnar á Barnaheiminum eru fjølbroyttar og verða settar út frá tørvinum hjá tí einstaka og deildunum, t.d. eygleiðingar og at leggja ætlan fyri tað pedagogiska arbeiðið.

Uppgávurnar hjá sálarfrøðinginum verða m.a.:

- sálarfrøðiligar kanningar/frágreiðingar
- terapi
- familjusamtalur
- vegleiða, undirvísa starvsfólk

og vera við til at menna stovnin saman við starvsfólkinum.

Ynskið er at seta ein autoriseraðan/kliniskan sálarfrøðing ella fólk við líknandi útbúgving.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og ummælum skal sendast til Føroya Barnaheim, att. Stýrið, Fríða Patursson, Pedda við Steingøtu 10, 100 Tórshavn innan 26. juli 2000. Løn sambært avtalu millum Føroya Landsstýri og Magistarafelag Føroya.

Meira fæst at vita við at venda sær til Sólrun Jacobæus, leiðara ella Karlu Danielsen, varaleiðara á telefon 31 23 20.

**Føroya Barnaheim**
Pedda við Steingøtu 10
FO-100 Tórshavn
Tlf. 312320 · Fax 311886

## Økispedagogur

**Dagrøktarskipanin í Tórshavnar kommunu er normerað til 300 børn, og umleið 65 dagrøktarmammur starvast í skipanini.**

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv við nógvum fakligum og persónligum avbjóðingum.

**Arbeiði fevnir m.a. um**
- vegleiðing av dagrøktarmammum
- skipa fyri ymiskum tiltøkum
- foreldrasamstarv.

**Vit ynskja**
at tú hevur royndir innan dagstovnaøkið, kann arbeiða sjálvstøðugt og hevur lætt við at samstarva.

**Setunarviðurskifti**
starvið verður sett 16. august 2000 ella sambært avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri í 11./13. lønarflokki.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Ingrid Midjord ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 17. juli 2000.

Tórshavnar kommuna

WWW.TORSHAVN.FO

## Skrivari søkist

LFÚ

Landsfelag Føroyinga í Útbúgving, søkir hervið eftir einum skrivara at taka sær av skrivstovu uppgávum felagsins. Starvið er 10 tímar um vikuna, og starvstíðin er fyribils sett til 1 ár fram. Arbeiðstíðin verður týsdag, hósdag og fríggjadag kl. 15.00-18.00.

**Skrivstovuuppgávurnar fevna seg um:**
Vanligt skrivstovuarbeiði, útskriving av LFÚ-kortum, skrivari á stjórnar- og aðalfundum, o.a. fyrifallandi arbeiði.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi starv í einum mennandi umhvørvi, sum viðvíkur ungum lesandi í Føroyum. Eitt starv saman við ungum fólki frá 19-27 ár, ið vilja virka fyri at útbúgvingarumstøðurnar hjá teimum lesandi í Føroyum alsamt gerast betur og betur.

Vit vænta at tú ert fyrikomandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Royndir innan skrivstovuarbeiði er sjálvandi ein fyrimunur, umframt at tú skalt vera før/ur fyri at nýta tekstviðgerðar forrit (serliga Microsoft Word). Eisini er ynskiligt, um tú hevur áhuga at arbeiða innan fakfelagsarbeiði.

**Starvið verður lønt eftir nærri avtalu.**

Umsóknarfreistin er úti 20. juli 2000, og verður starvið sett frá 1. august 2000.

Um hettar ljóðar sum nakað fyri teg, so send eina umsókn, umfram møgulig prógv og ummæli til:

**LFÚ**
Postrúm 136
Tinghúsvegur 18, 3. hædd
FO 110 Tórshavn

Ella send i-meyl til lfu@post.olivant.fo

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Ford Escort CLX 1,8 bensin, 5 hurðar
**Árg.:** 11/04-1995
**KM:** 62.698

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú og kann síggjast á bilverkstaðnum hjá Mogens Petersen, 826 Trongisvágur.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

tlf. 373890
fax nr. 373117
at hitta millum kl. 8.00–10.00

Magnus E. Joensen
sýnsmaður

## Verkfrøðingur

Tórshavnar havn søkir eftir verkfrøðingi til at taka fyri teknisku umsitingini av bygningum, bygningum o.ø. ognum hjá havnini eins o.o. fyrireikandi og umsitandi arbeiði.

Roknað verður við at umsøkjarin hevur royndir innan bygging/eftirlit/projektering, og at hann hevur kunnleika til EDV.

Umsøkjarin skal hava lætt við at samskifta, kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera røkin og hava vilja til at søkja nýggja vitan.

Tórshavnar havn kann bjóða eitt sjálvstøðugt og spennandi starv við nógvum avbjóðingum fyri framman.

Løn sambært sáttmála.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Tórshavnar havn.

Umsóknir saman við skjølum og møguligum viðmælum skulu sendast til

**Tórshavnar havn**
Postboks 103
110 Tórshavn

í seinasta lagi 6. juli 2000.


NÝGGJ FLØGA
## "Malan"
við Maluni Eyðunsdóttir



159,-

3arin

SMS · Tel 353535 · Fax 353536
E-mail: tryarin@post.olivant.fo

Vinarliga send mær:
______ eintøk av "Malan", á kr. 159.-
Navn: __________
Búst.: __________
Útfyll lepan, klipp hann út og send hann til: **3-arin, Postboks 1057, 110 Tórshavn**

FLØGUDEILDIN


**www.sosialurin.fo**